## Hegga skal venja 07 Vestur

Í gjárkvøldið varð sáttmáli undirskrivaður millum 07 Vestur og Jógvan Hendrik Samuelsen – Hegga – sum við hesum verður høvuðsvenjari hjá felagnum í 2010. Hegga hevur, síðani FS Vágar og SÍ gingu saman og stovnaðu 07 Vestur, verið knýttur at felagnum. Hann hevur hesi bæði árini verið hjálparvenjari hjá Piotr Krakowski, eins og hann hevur verið venjari hjá Unglingunum hjá 07Vestur. Tá Hegga nú er settur sum høvuðsvenjari hjá 07 Vestur, er tað í tráð við politikkin, sum í mestan mun er at byggja felagið upp við egnum fólki. Málið er tó greitt, nevniliga at vinna sætið aftur í fremstu deildini sum skjótast..



## Frem skavaði sær eitt stig

Tað eydnaðist Jónas Tór Næs og liðfeløgum hansara í danska 1. deildarfelagnum, Frem at bjarga sær eitt stig í evstu løtu í gjár. Frem spældi á útivølli ímóti FC Vestsjælland. FC Vestsjælland legði seg á odda, tá 25 minuttir vóru farnir. Leingi var líkt til, at dysturin fór at enda 1-0 til vestursælendska felagsliðið, men í yvirtíðini eydnaðist tað Frem at javna til 1-1 og fáa eitt stig við sær til Valby. Frem liggur tó enn undir niðurflytingarstrikuni. Liðið hevur bert fingið seks stig í 11 dystum.

# Gylti bólturin skal finnast

**Eingin av italsku heimsmeistarunum eru á listanum yvir teir 30, sum eru í uppskoti til at fáa gylta bóltin frá France Football**




Jákup Mørk

Seks spanskir europameistarar eru á listanum hjá France Football, sum eisini telur fimm brasilumenn, fýra bretar og fýra fraklendingar.

Til samans eru 30 nøvn á listanum hjá France Football, men hóast hetta er helst lítil ivi um, at at slagið fyrst og fremst stendur millum Lionel Messi úr Barcelona og Cristiano Ronaldo, sum nú spælir í Real Madrid.

Ronaldo vann í fjør gylta bóltin í dysti við júst Messi, men eftir framúrskarandi kappingarárið í Barcelona, har Messi vann tað, sum vinnast kundi – umframt at hann í Champions League finaluni skoraði móti Manchester United og Ronaldo, er lítil ivi um, at lítli argentinski bóltsnillingurin er heitasta uppskotið.

13 av teimum 30 spælarunum koma annars úr sponsku Primera. 10 eru úr ensku Premier League, sjey úr italsku Seriu A, fýra úr týsku Bundesliguni og ein einstakur er úr bestu fronsku deildini. Tað eru umboð fyri ítróttarpressuna hjá UEFA-londunum, sum greiða atkvøða.

Listin hjá France Football er hesin: Andrey Arshavin (Arsenal), Karim Benzema (Real Madrid), Iker Casillas (Real Madrid), Cristiano Ronaldo (Real Madrid), Diego (Juventus), Didier Drogba (Chelsea), Edin Dzeko (Wolfsburg), Samuel Eto'o (Inter Milan), Cesc Fabregas (Arsenal), Fernando Torres (Liverpool), Diego Forlan (Atletico Madrid), Steven Gerrard (Liverpool), Ryan Giggs (Manchester United), Yoann Gourcuff (Bordeaux), Thierry Henry (Barcelona), Zlatan Ibrahimovic (Barcelona), Andres Iniesta (Barcelona), Julio Cesar (Inter Milan), Kaka (Real Madrid), Frank Lampard (Chelsea), Maicon (Inter Milan), Lionel Messi (Barcelona), Luis Fabiano (Seville), Franck Ribery (Bayern Munich), Wayne Rooney (Manchester United), John Terry (Chelsea), Nemanja Vidic (Manchester United), David Villa (Valencia), Xavi (Barcelona), Yaya Toure (Barcelona).



Í fjør tók Ronaldo móti gylta bóltinum, men nógv bendir á, at hann í ár má taka til takkar við heiðrinum sum næst-besti spælarin í Europa

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 98 | 56 | 42 | 6 |
| 2 Tjaldur | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 106 | 70 | 36 | 6 |
| 3 Neistin | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 77 | 77 | 0 | 4 |
| 4 VB | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 42 | 59 | -17 | 0 |
| 5 StÍF | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 45 | 65 | -20 | 0 |
| 6 VÍF | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 67 | 108 | -41 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 125 | 113 | 12 | 6 |
| 2 VÍF | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 122 | 114 | 8 | 4 |
| 3 H71 | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 103 | 95 | 8 | 4 |
| 4 StÍF | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 82 | 76 | 6 | 4 |
| 5 Kyndil | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 110 | 114 | -4 | 4 |
| 6 KÍF | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 61 | 91 | -30 | 0 |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 2 | 2 | - | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| 2 Mjølnir | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 3 Dráttur | 2 | 1 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 2 |
| 4 Fleyr | 2 | 1 | - | 1 | 3 | 5 | -2 | 2 |
| 5 TB | 0 | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6 KÍF | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 7 ÍF | 2 | 0 | - | 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 2 | 2 | - | 0 | 6 | 2 | 4 | 4 |
| 2 Mjølnir | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 2 |
| 3 Fleyr | 2 | 0 | - | 2 | 3 | 6 | -3 | 0 |
| 4 ÍF | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

### Máltindurin, hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| Adina Petrea | Tjaldur | 37 (3) |
| Cornelia Rimbu | Tjaldur | 23 |
| Valentina Suciu | Stjørnan | 23 (8) |
| Liljan Durhuus | VÍF | 18 (3) |
| Simona Petersen | Stjørnan | 18 (4) |
| Jacklin Durhuus | Neistin | 17 |
| Annika Thomsen | Tjaldur | 15 |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 15 (4) |
| Roxanna Bodirlau | StÍF | 14 (3) |
| Marinela Patru | Tjaldur | 13 |
| Halla Midjord | VÍF | 12 |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 11 |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 10 |
| Sára Samuelsen | VB | 10 (1) |
| Anja Heinadóttir | Neistin | 9 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| Poul Kjartan Dam | H71 | 36 (11) |
| Sámal Joensen | VÍF | 34 (10) |
| Cristian Preda | StÍF | 29 (2) |
| Bárður Johannesen | Kyndil | 27 |
| David Edvardsen | Neistin | 27 (6) |
| Agnar Joensen | VÍF | 23 |
| Jugoslav Djumic | Neistin | 21 |
| Bjarti Hansen | VÍF | 21 |
| Gabriel Stanciu | StÍF | 21 (3) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 21 (5) |
| Heini Hanusarson | Neistin | 19 |
| Høgni Klein | Kyndil | 16 |
| Ingi Olsen | Neistin | 16 |
| Birgir Poulsen | Neistin | 15 |
| Dánjal Tórgarð | H71 | 14 (4) |